# Vøkur biograf-konsert við Høgni Lisberg



*Høgni og bólkurin spældu tey villaru løgini við stórari orku*



*Brandur Jacobsen á trummum legði trygga botnin*

**Nordisk Film boðar í sínum tíðindaskrivið um biografkonsertirnar við Høgna Lisberg frá, at biografhøli eru sera vælegnaði til tónleika framførslur, á konsertini í Metropol biografinum í Keypmannahavn fingu áskoðararnir sjón fyri søgn**

KONSERT
*Orð & myndir: Niels Uni Dam, nielsuni@sosialurin.fo*

Høgni Lisberg spældi í týskvøldið fyrstu av trimum biografkonsertum í Danmark. Konsertin í Keypmannahavn var sera væleydnað. Høgni og bólkur hansara eru við tíðini vorðnir sera væl samanspældir, og hetta merkti konsertina. Hon varð flott avgreidd.

### Í biograf í góðveðri

Tað tyktist annars eitt sindur løgið at skula inn í biografmyrkrið í góðveðrinum í Keypmannahavn týskvøldið. Hóast klokkan var sjey um kvøldið vísti hitamálarin á Ráðhúsplássinum 10 hitastig, og sólin skein frá einum bláum himli. Her var meira upplagt at fara ein gongutúr eftir Stroynum, enn at fara niður í kjallaran á Rådhusarkaden á konsert. Men niðri í salinum vísti løtan seg at gerast ein av teimum heilt góðu.

### Væl vald løg

Skráin hjá Høgna er nú vorðin so umfatandi, at hann kann velja og vraka hvørji løg hann spælir. Hetta gevur møguleikar fyri valum og frávalum, ið kunnu vera heppin ella óheppin. Sjálvandi eru løg, ið ein kundi sakna, serliga nøkur av betru løgunum á fyrstu fløguni hjá Høgna, ið heilt var tikin av skránni. Men tað kemst ikki uttanum, at á hesi konsertini virkaðu eingi løg, sum veikar løtur. Eisini var skráin á onkran hátt samanhangandi og einstátta á tann góða mátan. Hóast konsertin var umleið ein tíma, so kendist løtan alt ov stutt. Undirhaldið var stutt sagt so framúr gott. Frá fyrstu løtuni við kontri og hilla-di-hey kenda Just Dig til síðstu tónarnar av Dylan klassikaranum All Along The Watchtower, ið var eykalagið hetta kvøldið.

### Nýggja hæddarpunkt

Nøkur løg kunnu hálast fram sum serliga væleydnaði, eitt nú tað undurfulla Morning Dew, Léla og altíð góða Learn To Ride On Waves. Men eisini tey bæði nýggju løgini The Birth Of Stars og Being Out Of Town vóru hæddarpunkt. Í nýggju løgunum tykist Høgni at brúka røddina til fulnar. Bólkurin tyktist eisini serlig væl koyrandi í hesum báðum løgunum.

### Vakurt grafiskt fylgispæl

Afturvið framsførsluni vóru filmsbrot og ymiskur grafikkur sýndu á løriftinum, hetta riggaði sera væl. Serliga stuttligt var at síggja ymisku grafisku improvisatiónirnar yvir fyrra fløguhúsan til Morning Dew. Eg havi ongantíð verið fjeppari av hesum húsa, men á biografkonsertini fekk hann nýggja og djypri meining.

### Tørvar nýggjan gittar

Samanumtikið taldist hetta millum tær heilt góðu konsertirnar hjá Høgna og bólki hansara. Men karmarnir lyftu konsertina enn longur upp. Tó kann eg ikki lata vera við at fýlast at ljóðinum, serliga fyrstu løtuna var bassurin dekan ov harður og trupult var at hoyra tann eina gittarin, tað skiltist, at hetta var orsakað av tøkniligum trupulleikum við júst hesum gittara, men hetta batnaði eftir eini løtu, tá ljóðmaðurin við skynsemi fekk arbeitt rundanum um trupulleikan. Eitt sum ikki batnaði var tann evindaliga stemmingin av gittaranum. Høgni Lisberg hevur uttan iva tørv á einum nýggjum gittara, tí millum hvørt lag gekk ein løta, har Høgni stemmaði gittarin. Hetta var stutt sagt irriterandi.

### Bygdasligt á tann góða mátan

Tað er okkurt so deiliga sjarmerandi bygdasligt við tónleikinum hjá Høgna, hetta kom veruliga til sjóndar á konsertini, og eg fekk á onkran hátt nakrar Bruce Springsteen kenslur av at sita og hoyra bólkin. Serliga kom hetta sjarmerandi bygdasliga til sjóndar í lagnum Desert, har allir tónleikararnir reistust frá sínum ljóðførum og sungu og spældu í flokki fremst á pallinum, millum annað við Brandi Jacobsen standandi og bukandi á eina trummu við kustum. Herlig løta.

Konsertferðin helt fram í BioCity í Odense mikukvøldið og hóskvøldið kl. 19.00 spælir Høgni í Biocity í Århus. Konsertferðin verður fyriskipa í samstarvi við Nordisk Film Biografer A/S.

### Setlisti hjá Høgna Lisberg á konsertini

1. Just Dig
2. Stargazers
3. Léla
4. Morning Dew
5. Stand By My Side
6. The Birth Of Stars
7. Been Out Of Town
8. Desert
9. How Many Times
10. Rise & Shine
11. Learn To Ride On Waves
12. All Along The Watchtower (eykalag)

VINNUMÁLARÁÐIÐ



Móttøka fyri
**Kjartan Kristiansen**

**Fríggjadagin 30. mars kl. 14:00**

skipar Vinnumálaráðið fyri móttøku í hølunum hjá Menningarstovuni á Bryggjubakka 12

í sambandi við, at Kjartan Kristiansen fer frá sum stjóri.